GJALDSTOVAN

# Frásøgn frá ársfundinum hjá Landsneti 2023

Hotel Hilton Garden Inn 06. oktober 2023

Um 100 luttakarar vóru á fundinum hjá Landsneti 2023. Dyrnar lótu upp kl. 11, og miðmáli var at fáa millum kl. 11:30 og 12:00.

## Praktisk viðurskifti, Durita Hansen, samskiftisfólk á Gjaldstovuni

Fundurin byrjaði beint eftir kl. 12 í fundarhølinum Hoydalar. Durita bjóðaði vælkomin og kunnaði um praktisk viðurskifti. Hon greiddi frá um SLI.DO, og bað luttakararnar um at brúka tað til spurningar, sum verða svaraðir, tá ið tilfarið frá fundinum verður lagt út. Síðan vísti hon á skránna og gav Leif Abrahamsen, stjóra á Gjaldstovuni, orðið.

## Vælkomin, Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni

Leif fegnaðist um at síggja so nógv fólk á ársfundi hjá Landsneti. Hann valdi at varpa ljós á nettrygdarætlanina 2024 -2026, sum landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur lagt fram. Vit mugu taka nettrygdina í størsta álvara, tí Cybercrime búskapurin er blivin ein av størstu búskapum í heiminum við $3 trillion USD. Vit hava nógvar dyr út á netið og eru tað tí sjálvsagt eisini dyr inn á okkara net. Vit eru øll møgulig offur fyri Cybercrime. Leif vísti eisini á onnur tøl frá 2022 um, hvussu nógv álop hava verið kring heimin. Fylgja vit trygdarkrøvum og syrgja fyri, at atgongdarkotur og líknandi eru ílagi, er tað ein góð byrjan. Vit hava fleiri kritiskar skipanir, millum annað á TAKS, bankar, heilsuverk og fleiri aðrar. Tað er umráðandi at hava góðan trygdarpolitikk á øllum økjum, og at vit halda okkum til hann. Hann vísti síðan á eitt dømi frá 06. september 2018, tá hann brádliga ikki fekk fatur á internetinum. Tað var nic.fo, ið varð álopið, og hakkarar høvdu yvirtikið servaran. Tað vóru "vinaligir" hakkarar, so vit fingu allar dátur aftur. Áðrenn henda dagin vóru tað nokk ikki nógv, ið høvdu hoyrt um nic.fo áður, men tá bleiv tað kent. Føroyar eru ikki so lítið áhugaverdar, sum vit kanska halda.
Eitt annað øki, sum er sera týdningarmikið, er orkukervi. Í august 2022 var eitt álop á føroyskt orkufelag, og aftur herfyri varð Danskscanning.dk hakkað. Tey hava millum annað skannað stóran part av tilfarinum hjá Umhvørvisstovuni. Tíðindini um álopi eru almenn og liggja á onkrum tíðindasíðum. Dáturnar hjá US, sum eru hjá Danskscanning, eru krypteraðar.

Tí eru tær tryggar. Djóni á Boðanesi frá Gjaldstovuni fer at greiða nærri frá hesum seinri. Tað er umráðandi, at back-uppar liggja trygt og eru fullkomnir, so tað er møguligt at fáa allar dátur og skipanir innaftur.

## Formansfrágreiðing, Bergur Hansen KT-leiðari á Landsverki og formaður í brúkararáðnum fyri Landsnet.

Bergur greiddi fyrst frá við tølum, hvat brúkararáðið er, og hvat tey hava gjørt seinasta árið. Út frá eini spurnarkanning, ið varð gjørd áðrenn seinasta ársfund, vistu fólk lítið og einki um, hvat brúkararáðið var fyri nakað. Tí setti brúkararáðið sær nøkur fokusøkir, ið tey skuldu arbeiða við fram til fundin í ár. Eitt fokusøki var at gera brúkararáðið meira sjónligt – millum annað við at stovna ein Teams-bólk til úrvalsbrúkarar við vitanardeiling sum endamáli. Eitt annað tiltak, tey skipaðu fyri, var einum úrvalsbrúkaradegi. Hetta var fyri at knýta brúkaran tættari at brúkararáðnum. Nú fingu úrvalsbrúkararnir, brúkararáðið og kt-skivan møguleika at seta andlit á fólk, sum tey annars bara kenna frá telefonsamrøðum. Á úrvalsbrúkaradegnum var teambuilding fyrrapart, og seinrapartin vóru 7 verkstovur. Í verkstovunum varð víst, hvussu tú brúkar ymisk forrit í  Landsnet-pakkanum. Síðan vísti Bergur eisini úrslitið frá nýggjari brúkarakanning, har spurt varð: “Kennir tú  brúkararáðið?”. Svarmøguleikarnir vóru “Ja” ella “Ordiliga væl”. 😊 At enda kunngjørdi Bergur nýggja brúkararáðið. Og tey eru:




## Landsnet: Á ferð inn í framtíðina. Støðulýsing og visjón, Birgir av Steinum, deildarstjóri á Gjaldstovuni:

Birgir byrjaði við at takka brúkararáðnum fyri arbeiði seinasta árið.
Síðan seinast. Tað hava verið verkstovur í PowerBI, og mannagongdir eru gjørdar fyri, hvussu hetta amboð kann brúkast og best practices saman við frágreiðing um, hvør og hvussu tú kanst deila upplýsingarnar/ dáturnar, sum tú tekur út í PowerBI. Sjálvi fara vit at royna at fáa billing-skipanina í PowerBI.

Vit hava havt eitt linju útboð, sum FøroyaTele vann. Nýggja avtalan er gjørd yvir 3 ár. Skjalhald er fyri fyrstu ferð dagført. Fyrr máttu vit dagføra journalskipanina 3600 26 ferðir, tí stovnarnir høvdu hvør sína loysn. Hesaferð er alt í einum, tí vóru vit sera spent um, hvussu hetta fór at ganga. Til dømis skuldi klienturin út til 1.200 teldur. Sum heild gekk hetta væl. Vit hava fingið føroyska Skjalhald, og har eru yvir 20.000 linjur týddar. Um tú ynskir føroyskt mál í Skjalhaldi, skalt tú broyta máli í kaganum, so føroyskt stendur ovast. Eisini er knýtið í FOLK liðugt ment, og hetta koyrir dagliga nú. Knýtið til Vangan, har oyðubløð kunnu stovna mál sjálvvirkandi, er eisini liðugt ment. Tjóðskjalasavnið er fyrsti stovnur sum kann royna hetta.
Sikker e-mail koyrir hjá 23 stovnum. Tað verður millum annað brúkt til samskifti við danskar myndugleikar. Í næstum verða allir stovnar á Sikker e-mail, so øll kunnu senda Sikker-e-mail í ár. Hetta er við í gjaldinum fyri Landsnet, so eingin eyka kostnaður er fyri tað.
Eisini eru fleiri aðrar skipanir dagførdar, og Windows 11 er nú tøkt hjá stovnunum. Eftir okkara meting hevur Windows 11 ikki verið nóg trygt fyrr enn nú. Hvat gert tú so við gamlar teldur? Tað ber til at reinstallera telduna við Windows 11, um tú vilt.
Til seinasta ársfund var ein nøgdsemiskanning gjørd, sum formaðurin í brúkararáðnum eisini var inni á. Kanningin vísti, at fleiri viðmerkingar gingu aftur. Til dømis at KT Landsins er so lítið sjónligt úti á stovnunum. Roynt verður at fáa tíð til tað, við at gera nøkur átøk á KTLandsins. Í bólkum tóku vit samanum og arbeiddu við at savna saman mannagongdirnar í eina skipan, sum Talgildu Føroyar eisini brúka. Tær lógu ymsastaðni - okkurt í Helpdesk; okkurt í Sharepoint og okkurt í Teams. Eitt annað evni er sjálvgreiðsla til loyniorð. Skipanin er har, men mannagongd/vegleiðing manglar. Eitt triðja punkt er sjálvvirkandi uppseting av teldum. Sum er tekur tað alt ov langa tíð at seta teldur upp. Hetta verður broytt soleiðis, at tit, tá tit hava bílagt eina teldu, fáa telduna sjálvi. Hon verður sett upp, tá tit knýta hana í netið.
Komandi verkevnir eru millum annað Networkasaservice (Naas), har stýringin av útgerðini verður miðsavnað so bert frammanundan góðkend útgerð sleppur á netið. Viðvíkjandi Skjalhaldi ætla vit at brúka Teams sum fundarmodul; fáa innlitsmodul og møguliga gera okkurt við PowerBI fyri at fáa hagtøl úr skipanini. Viðvíkjandi nettrygd eru 20 minstukrøv frá Sikker Digital. Tað er ymiskt, hvussu væl vit fylgja øllum krøvunum. Tey flestu eru á stigi við ella oman fyri minstakrav. Viðvíkjandi Security Operations Center (SOC) er ætlanin at fáa ein trygdarveitara at halda eyga við okkara dátum. Um vit skulu manna eitt 24/7 toymi, mugu

vit seta 7 til 8 fólk bara til tað. Hesi skulu eisini lærast upp. Tá tú samanber kostnaðin fyri 7-8 starvsfólk og kostnaðin fyri at lata onnur um SOC, er kostnaðurin fyri tænastuna ikki stórur. Birgir vísti síðan inntøkur og útreiðslur fyri Skjalhald, sum gevur hall í løtuni. Eisini Landsnet yvirhøvur gevur hall. Hann vísti á, hví tørvur er á, hægri inntøkum. Licensir eru dýrkaðir og tørvur er á fleiri starvsfólkum. Tí kemur ein príshækking, sum kunnað verður nærri um seinri í ár. At enda var ein stutt lýsing av Landsneti í tølum. Vit eru í 8 londum; á 60 stovnum; á 200 ymiskum lokalitetum og vit hava 3000 brúkarar.

## Få mest ud af Microsoft 365 Nilu Safar, Technical Solution Specialist, Microsoft:

Nilu segði, at tittulin beint nú er Modern Work Technical Specialist. Hjá Microsoft skifta tey ofta tittul eftir, hvussu Microsoft er bygnaðarliga.
The shift to Hybrid World: Gongd er serliga komin á hetta, eftir at Covid byrjaði í 2020. Umráðandi bleiv at fáa fatur á øllum skipanum og dátum líkamikið, um tú arbeiddi heimanífrá ella á skrivstovuni.
Eitt, sum tey arbeiða nógv við, er at betra um fundarmøguleikarnar ella samstarvsrúm, so at tað ikki altíð er neyðugt, at øll eru saman samstundis.
Tað eru nógvar Microsoft appir við alskyns møguleikum. Microsoft roynir at fáa atgongd til allar í Teams, so tú fært atgongd til allar dátur tann vegin og tryggjar tær, at alt verður goymt sama stað. Nýggja strategiin er eisini at fáa atgongd til onnur 3. parts produktir í Teams. Í Microsoft eru elementini í Teams – Meet, Chat, Call, Collaborate og Automate.
Tey arbeiða við at betra um arbeiðsgleðina og trivnaðin hjá brúkarunum. Hetta verður millum annað gjørt við bólkingum, sum eru í Microsoft Viva, har tey royna at Empower people and teams to be their best. Til dømis at tú sum brúkari ikki ert online alla tíðina. Her verður serliga hugsað um fólk við arbeiðsplássi heima. Arbeiðsgevarin eigur at hava eina strategi fyri, hvussu tú brúkar skipanirnar rætt. Tað ber til at fáa ráðgeving frá Microsoft um hetta.
Trygd: Tað verður alsamt meira umráðandi, at trygdin er í lagi. Fleiri og fleiri eru farin at arbeiða heimanífrá og eisini uppliva vit fleiri og meira sofistikeraði Cyper álop. Fleiri av okkum verða rakt av phishing, og útivið 70 prosent av øllum dáta-missum standast av phishing álopum. Høvuðstættirnir innan atgongdarstýring – ella tær tríggjar meginreglurnar eru – Verify explicitly – Use least privilege access og Assume breach. Atgongdirnar verða stýrdar við at geva veitarum tíðaravmarkaða atgongd. Tey viðmæla ikki Global admin, men

heldur at hava fleiri admin leiklutir. Við hesum verður lættari at avmarka, hvat ein møguligur hakkari fær atgongd til.
Compliance. Data regulations are increasing around the world. Av tí at tað eru so ymiskar lógir at halda seg til, er hetta eitt torgreitt øki at arbeiða við.
Microsoft Preview information protection – er eitt amboð til at flokka tínar dátur við. Hetta skal helst ikki gerast manuelt, men heldur sjálvvirkandi. Hvussu kanst tú tryggja, at fólk ikki taka dátur við sær - eitt nú tá ið tey fara í feriu, ella fara úr starvi. Har má arbeiðsgevarin hava reglur fyri, hvørjar eindir og dátur starvsfólk hava atgongd til heimanífrá og hvørjar, tey kunnu taka við sær. Til dømis eisini hvar tú goymir dátur, so næsta starvsfólk fær atgongd til tað.
Microsoft 365 copilot, sum riggar tvørtur um øll Microsoft produkt, er grundað á tøkni frá chat-gdp. Stuttur filmur var um hetta. Tú kanst senda dátur úr eini app til "Microsoft Graph – sum sendir til Large Language Model (LLM) frá internetinum. LLM sendir aftur aftur til MG og hiðani fært tú tínar dátur vístar í tí appini, sum tú byrjaði í. Til dømis í PowerPoint.
At enda vísti hon tilgongdina frá "Getting started with Microsoft 365" til "Keep going with Microsoft 365" til "Go the last mile with Microsoft 365"

## Diana Gilstón, um PowerBI – Hvussu PowerBI kann broyta virksemið – Goymdar dátur í ljósmálan.

Diana vísti, hvussu startsíðan hjá leiðarunum kann síggja út, og er hon ymisk alt eftir ábyrgdarøki.
Arbeitt verður í løtuni við at fáa síður gjørdar til málsviðgerðar. Her kunnu øll, sum hava atgongd síggja, hvussu nógv mál eru opin og avgreidd umframt avgreiðslutíðina fyri lokaði mál. Hesi yvirlit kunnu gerast fyri allan stovnin og einstøku deildirnar. Tað ber til at síggja, hvat slag av málum talan er um. Síðan greiddi hon frá drúgvu tilgongdini hjá TAKS. Neyðugt var at fyrireika, eftirkanna og skipa útvaldar dátur, sum skuldu brúkast í samband við nýggju íløguna.
Tá tú byrjar eina slíka tilgongd, sum er krevjandi fyri bæði leiðslu og starvsfólk, kann tað vera torført at fáa starvsfólkini við. Hetta merkir jú eyka arbeiði og eisini "fleiri klikk" í dagligu málsviðgerðini. Tað hevur tikið TAKS umleið trý ár at koma higar.
Tá ið talan er um fíggjarstýringina hjá TAKS, hevur núverandi fíggjarleiðari, sum hevur holla vitan um uppseting av rapportunum og brúk av PowerBI, verið við til at bera hetta á mál.

Tað hevur ikki verið vanligt at hava slík amboð og hagtøl á TAKS. Tað kann tískil hugsast at summi starvsfólk kunnu vera eitt sindur skeptisk um at taka slíka skipan í brúk. Ein skipan, sum gevur leiðsluni betur innlit í alt, sum starvsfólkini gera.
Á TAKS hava tey roynt aðrar loysnir, men eru nú endaði við PowerBI, har tú kanst skraddaraseyma loysnina til at vísa tað, tey brúk fyri.
Tað er umráðandi at hava fólk in-house til hetta, tí tað eru tey, sum hava vitanina saman við uttanhýsis dátugreinaranum til at arbeiða við hesum. Við hesi skipan hevur TAKS fingið betri vitan um, hvat stovnurin viðger í løtuni og um, hvussu stórt arbeiðstrýstið er. Tey eru 110 starvsfólk, og av og á er neyðugt at flyta fólk ella uppgávur millum deildir. Tað fært tú lættari gjørt, tá tú hevur slíkt amboð.
Sum er hevur TAKS nógvar dátur, sum koma úr Vanganum, Borgaraglugganum, Vinnuglugganum, lønarskipanini og oyðublaðsskipanini. Øll skjøl, sum koma umvegis hesar sjálvgreiðslur og skipanir, verða automatiskt stovnað sum mál í 3600, og tað lættir um at tú sleppur undan at stovna málini manuelt.
Birgir, spurningur/viðmerking: Tú skalt kenna tínar dátur fyri at fáa tær rætt út aftur. Ikki bara Plug and Play? Diana. – Nei, tað er ikki so lætt. Birgir, greiddi síðan frá, at dátur úr til dømis BSL/Leiðslukunning verða vístar í PowerBI.

## Innannetið hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, Jaspur Langgaard, stjóri Intra.

Jaspur byrjaði við at greiða frá, hvat Intra ger. Tey hava umleið 400 kundar, ið eru í Danmark, Grønlandi og Føroyum. Størsti parturin av inntøkuni stavar frá virkseminum í Danmark. Við loyvi frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum (ARB) vísti hann síðan nakað av tí, sum tey brúka sítt innannet frá Intra til.
Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði brúk fyri einum ”vanligum” innanneti, har tey kundu fáa atgongd til alt á einum staði. Har tey millum annað kundu fáa ymiska kunning, umbøn um feriudagar, yvirlit yvir, hvør brúkar bilarnar o.s.fr. Tey vildu síggja hetta í eini app á telefonini og í telduni. Her vísti Jaspur, hvussu innannetið hjá ARB sær út við 10 flykrum, har tey til dømis eisini kunnu bíleggja bil. Av tí at Intra hevur fleiri stórar kundar, sum eitt nú Odense lufthavn, hava tey ment og effektiviserað mannagongdina, tá nýggj starvsfólk skulu hava lyklakort. Hesa skipan hevur Intra broytt, so ARB kann brúka hana til endurnýggjan av vinnukavara prógvum. Vinnukavarin sendir sjálvur upplýsingar inn í eina skipan, og tá ARB hevur verið inni og váttað upplýsingarnar, verður endurnýggjaða vinnubrævið skrivað út.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

Enn er tað í einum printara. Men seinri verður tað møguliga í skjáttuni, sum Talgildu Føroyar hava ment.
Síðan kom Jaspur inn á prísmyndilin, har tað kostar 40.000,00 krúnur fyri at koma á innannetið, og síðan 700,00 krónur um mánaðin fyri stovnin/kundan og 25 krónur fyri hvønn brúkara. Einki eykagjald fyri uppfylgjandi spurningar.
Viðmerking frá Leivi, ARB. Vit høvdu brúk fyri eini out-off the box skipan. Hetta er eitt einfalt produkt, har tú kanst velja ymiskar flykrur til ella frá eftir, so tú hevur tað tú hevur brúk fyri. Av tí at fleiri kundar eru á frammanundan, fært tú ein part ókeypis, tí onnur longu brúka loysnina. Tey eru ein lítil stovnur og tí er gott, at tey ikki skulu brúka nógva tíð og orku til at byrja upp á nakað nýtt. Tey eru til dømis serliga glað fyri loysnina til teirra vinnukavarar, sum er parturin av skipanini, ið varð gjørdur til Odense lufthavn.

## Nettrygd. Hvønn leiklut hevur tað almenna í nýggju heildarætlanini, Djóni á Boðanesi, KT Trygd á Gjaldstovuni

Djóni vísti á tað, sum er skrivað á heimasíðuna hjá UVMR um uppraðfestingina av nettrygd. Okkum tørvar eina nettrygdarætlan at standa ímóti við, tá ið vit verða fyri álopum. Millum annað fyri at koma víðari, um kritiskar skipanir sum el, heilsuverk og teleundirstøðukervið skuldu verðið rakt. Hetta er bert galdandi fyri álvarslig álop á kritiskar skipanir og ikki fyri einstakar brúkarar, ið verða hakkaðir.
Djóni vísti á, hvør hevur ábyrgd av nøkrum av yvirskipaðu átøkunum í nettrygdarætlanini, og nær tey skulu gerast sambært tíðarætlanini. Tað eru serliga aðalráð og almennir stovnar, ið skulu útinna hetta arbeiðið.
Átak nr. 6. Gera nettrrygdarlóg, sum byggir á NIS2 direktivið.
NIS2 ásetir millum annað, at dátur, sum hoyra til samfelagstýðandi undirstøðukervi, skulu liggja á einum tryggum kt-palli. Eisini eru ásetingar um kt-grannskoðan, og nettrygdartilbúgving. Hetta fer eisini at ávirka privatar fyritøkur og kommunalar skipanir. Vinnuhúsið, vegna privatu fyritøkurnar, og Kommunufelagið kunnu tí verða partar av hesi verkætlanum.
Høvuðsatlitini í NIS2 eru millum annað mikroøkonomisk atlit, GDPR tekur atlit at rættindunum hjá tí skrásetta, og NIS2 tekur eisini samfelagslig og makroøkonomisk atlit.
NIS2 yvirskipað: Leiðslan skal góðkenna váðar og tiltøk; samfelagsligar avleiðingar; hava førleikar at taka sær av uppgávuni og tryggja eftirlit. Starvsfólk skulu førleikamennast við at

luttaka á skeiðum. Og ansast skal eisini eftir, at váðagreiningar og trygd taka atlit at borgarum.
Tað er neyðugt at tryggja sær, at veitari og undirveitari eru vitandi um og arbeiða eftir neyðugum trygdarreglum. Av tí at hetta eru umfatandi krøv, fer tað at kosta fyritøkum at seta nýggju trygdarkrøvini í verk. Trygdarbrot skulu fráboðast innan fyri 24 tímar. Verður føroyska lógin lika sum dátuverndarlógin, har almennir stovnar ikki kunnu fáa sekt, men bara privat fáa sekt? Tað vita vit ikki enn, tí lógin er ikki gjørd.
Fyri at hækka nettrygdarstigið á stovnum og skipanum hjá landinum verða nøkur átøk sett í verk. Dagføring av trygdarrundskivinum verður gjørd. Eisini skal fastur leistur gerast fyri rapportering til stjórnarráðini og ætlan fyri vavi á kt-grannkoðanini. Stovnar við samfelagstýðandi kt-skipanum skulu hava góðkend kt-trygdarfólk. Men hetta kann vera ein avbjóðing, tí ringt er at fáa kt-fólk sum er.
Gjaldstovan skal møguliga bjóða ein víðkaðan trygdarpakka, har vit hjálpa til við at meta um og greina váðan. Hetta kann vera trupult, um stovnurin hevur fleiri uttanhýsis veitarar. Tá kann vera ringt at síggja, hvørjar skipanir eru samfelagskristiskar.
Samfelagstýðandi kt-undirstøðukervið má verjast. Har má kortleggjast, hvørji samfelagstýðandi kt-undirstøðukervi eru í almenna- og privata geiranum og lýsa sambondini millum skipanir og gera tilmæli um at skipa eitt samdøgursmannað átakstoymi.

Samanumtøka: Hvussu rakar nettrygdarætlanin okkum?
Viðvíkjandi smærri stovnum er ilt at meta um, hvussu viðkomandi tað er, um tey ikki hava nakra samfelagskritiska skipan. Eisini tí tað veldst um hvussu føroyska lógin verður orðað. Stovnar við samfelagstýðandi tænastum verða fevndir av nýggju lógini, og kunnu vænta at Vinnustovnurin – Nettrygd kemur á vitjan at kanna, hvørji átøk tey hava gjørt ella hava í hyggju at gera.

Orðstýrari: Birgir av Steinum
Myndatøka: Høgni Poulsen/Durita Hansen
Teknikkur: Helgi Hvannastein
Skrivari: Randi Á. Jakobsen

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO